# GPS á minnisveik – umsorgan ella eftirlit?

RANNVÁ SÓLHEIM
ráðgevi í Dátu-eftirlitinum



Spurningur hevur verið frammi um, hvørt tað er loyvt at nýta GPS til minnisveik fólk, soleiðis at tey kunnu sporast aftur, um tey fara út og ikki finna heimaftur

Hóast fólk eru minnisveik, kunnu tey vera væl fyri fysiskt og tískil kann tað tykjast sera skerjandi fyri teirra persónliga frælsi, um tey ikki fáa møguleika fyri at fara út, ganga túrar, fara at keypa osv. Tað eru óivað fleiri, sum minnast ta donsku sjónvarpsrøðina “Sommer”, tá ið minnisveiki lækn-in, Christian Sommer bleiv burtur, og fólk í hópatali gingu runt í skóginí og leitaðu eftir honum.

Við at seta ein GPS´ara á minnisveik fólk, so fáa tey fríheitina aftur, tí at tey altíð kunnu sporast aftur við GPS-skipanini!

MEN spurningurin er, um hetta er gongda leiðin?

**Hvør skal taka avgerðina?**

Í Føroyum eru enn ongar serreglur um nýtslu av GPS´arum. Tá talan er um elektroniska viðgerð av persónsupplýsingum, sum tað er í hesum føri, og ongar serreglur eru, so fellur hetta økið undir persónsupplýsingarlógina.

Persónsupplýsingarlógin er mest at skilja sum ein rammulóg og kann tískil brúkast til alla viðgerð av persónsupplýsingum. Av somu orsøk, er ikki lagt upp fyri serligum viðurskiftum á ymiskum serøkjum, sum t.d. tá talan er um nýtslu av GPS á minnisveikum.

Sambært persónsupplýsingarlógini skal gerast ein meting av, hvørt áhugamálini hjá avvarðandi ella bústovnum fyri at nýta GPS viga tyngri enn fyrilitini fyri tí minnisveika. Avgerðin kann eftirmetast av Dátueftirlitinum í síðsta enda.

Hetta er ein torfør uppgáva at meta um, tí at tað eru so nógvir ósvaraðir spurningar, sum stinga seg upp - spurningar sum fakfólk eiga at taka støðu til, t.d:

- Í hvørjum føri skal GPS nýtast?
- Hvussu minnisveik skulu fólkini vera?
- Skulu felags mannagongdir gerast fyri alt landið?
- Hvør skal taka avgerðina, um persónurin sjálvur ikki er førur fyri at gera tað?
- Kunnu avvarðandi samtykkja?
- Skal ein læknalig meting gerast í hvørjum einstøkum føri?
- Hvør kann fáa atgongd til upplýsingarnar frá GPS´aranum?

**Serligar reglur**

Í Danmark er tað serliga tann sokallaða “Serviceloven”, sum regulerar hetta økið. Um so er, at tann minnisveiki ikki sjálvur er førur fyri at geva eitt samtykki, kunnu sosialir myndugleikar í ávísum føri geva loyvi til, at GPS kann nýtast í eitt avmarkað tíðarskeið. Í Servicelógini eru tó sera strong krøv til, nær sosialir myndugleikar kunnu geva loyvi, t.d. skal tað prógvast, at tað er ein vandi fyri, at persónurin setir seg sjálvan ella onnur í vanda, um viðkomandi fer frá húsum. Harafturat er tað eitt krav, at tað skal vera alneyðugt at nýta GPS´ara. Støðugt at kunna yvirváka, hvar ein persónur er, verður mett at vera sera skerjandi fyri persónliga frælsið, so tískil skal nýtsla av GPS vera síðsti útvegur.

At nýta GPS var eitt av evnunum, sum var tikið upp á norðurlendskum dátueftirlitsfundi, sum var í Føroyum fyrst í juni mánaða. Á fundinum kom fram, at summi norðurlond høvdu serreglur á hesum øki, meðan onnur ikki høvdu. Semja var um, at hetta økið átti at verið regulerað í serlóg, tí at ásetingarnar í persónsupplýsingarlógini eru ikki ætlaðar til at regulera eitt slíkt serøki.

**Samanumtikið**

Sum nevnt omanfyri, er tað ein trupulleiki, at reglur vanta á hesum øki, og er hetta eitt mál, landsins politikarar áttu at tikið upp.

Tó hevði tað verið áhugavert at fingið kjak um hetta evnið, hvørt tað er rætt at loysa ansingar- og umsorganaruppgávur við GPS, og um slíkt eftirlit er valdsnýtsla ella møguliga tvørturímóti ein liður í umsorganini?

# So uppfunnu vit aftur tann djúpa talerkin

HELGI ABRAHAMSEN



Norðurlond fara at samstarva meira úti í heimi og fara at hava felags sendistovur. Tað visti Útvarpið at siga týskvøldið 30. juni. Útvarpið segði eisini frá landsstýrismanninum í uttanríkismálum, at Føroyar kunnu fáa stóra nyttu av hesum samstarvinum.

Hetta eru gleðilig tíðindi, tí sjálvandi skulu vit samstarva við onnur, har tað kann gerast við fyrimuni.

Men fara vit bara tvey ár aftur í tíðina, so var støðan ein heilt onnur. Tá varð arbeitt við at opna eina føroyska sendistovu í Íslandi, og lagt varð upp til, at hon skuldi halda til á donsku sendistovuni í Reykjavík. Men av eini ella aðrari orsøk skapti hetta eina nationalistiska øsing í Føroyum. Tað mátti ikki henda, at føroyska sendistovan fór at húsast inni á donsku sendistovuni, tí har veittraði danska flaggið uttanfyri. Tað kundi heldur ikki góðtakast, at pláss varð givið fyri bæði føroyska og danska flagginum. Úrslitið varð, at landsstýrið mátti út í býin at leiga eina skrivstovu fyri nógvar pengar, bara fyri at sleppa undan tí danska flagginum. Hetta má vera toppurin av misskiltari nationalismu.

Eg havi ikki hoyrt nakað um, at Føroyar hava broytt politikk viðvíkjandi sendistovum, og tí gangi eg út frá, at tað sum hendi í Reykjavík fyri tveimum árum síðani, framvegis er galdandi. Tað vil siga, at um Føroyar skulu samstarva við onnur Norðurlond um felags sendistovur, so er tað framvegis ein treyt, at bara tað føroyska flaggið veittrar uttanfyri. Tað sigur seg sjálvt, at tá vit ikki kunnu vera í hølum í Reykjavík, har danska flaggið veittrar, so kunnu vit heldur ikki vera á sendistovum, har hini norðurlendsku fløggini eru í nærumhvørvinum.

Tað sama má sjálvandi eisini vera galdandi fyri ST og aðrar altjóða felagsskapir. Fáa Føroyar einaferð í framtíðini sjálvstøðugan limaskap har, so mugu øll hini fløggini takast niður. Hetta er føroysk nationalisma, tá hon er uppá tað allar besta.

**Dupultstrategi**

Føroyingar hava eina dupultstrategi hvat sendistovum viðvíkur. Við aðrari hondini stríðast vit fyri at steingja okkum sjálvi úti frá donsku ambasadunum, meðan vit við hinari hondini royna at opna fyri norðurlendskum samstarvi, og so rokna vit sjálvsagt við at fáa stórar fyrimunir afturfyri stríðið? Hvat vilja vit? Er samstarv gott ella er tað ikki gott?

Eg tosaði einaferð við ein fiskaseljara, sum hevði selt fiskavørur til fleiri fjarskotin lond. Onkurntíð høvdu trupulleikar stungið seg upp, og tá hevði hann vent sær til donsku ambasaduna í avvarandi landi. Haðani hevði hann hvørja ferð fingið ta hjálpina, hann hevði havt brúk fyri. Hetta hevði ikki verið ókeypis tænasta, men tænastan hevði verið pengarnar verd.

Men hvat kunnu tær føroysku sendistovurnar bjóða á tí økinum? Hava tær starvsfólk, ið hava royndir innan vinnuligt søluarbeiði, ella er hetta kanska ikki eitt av endamálunum við at hava sendistovur?

Hví skulu vit seta føroyskar sendistovur á stovn, um tænastan á donsku ambassadunum er bæði betri og bíligari? Og hví skulu vit hefta okkum at øðrum Norðurlondum, samtíðis sum vit ríva okkum leys frá at samstarva við tað Norðurlandið, sum vit hava drúgvastu royndirnar við? Hvussu ofta skulu vit uppfinna tann djúpa talerkin?

**Eingin sjálvfylgja**

Eg taki fult undir við tankanum um samstarv, og er tað so, at sendistovur eru eitt gott samstarvsøki, so latið okkum endiliga gera brúk av tí. Men fyrst av øllum eiga vit at gera upp við okkum sjálvi, hvat vit fáa í einum norðurlendskum samstarvi – bæði í mun til samstarvið við Danmark og í mun til okkara egnu sendistovur, og so eiga vit ikki at útiloka møguleikan fyri at steingja tær føroysku sendistovurnar, um tað vísir seg, at úrtøkan er ov lítil í mun til kostnaðin.

# Mugu dúva uppá góða viljan – eina stund afturat

Blind, deyv, menningartarnað og onnur ið bera brek, mugu enn dúva uppá tann góða viljan, tá tað snýr seg um at koma inn í bygningar, ferðast um landið osfr.

Innlendismálaráðið fer fyrsta dagin at seta í gildi kunngerð, sum skal beina burt tær forðingar, sum gera, at fólk, ið bera brek, ikki kunnu ferðast frítt í samfelangum. Men so leingi henda regla ikki er sett í gildi, er umráðandi, at fyriskiparar hugsa um atkomuviðurskiftini í síni heild.

Hásummar er, og nógv forvitnislig tiltøk eru at fara til. Øll eiga at fáa høvi at luttaka, og soleiðis kunna vera ein virkin partur av øllum tí, sum verður bjóðað. Jú betri viðurskiftini eru, tess fleiri kunnu luttaka.

Hetta er ikki minst galdandi, nú festivalar og stevnur eru fyri framman, og nógvir gestir vitja land okkara.

Málið er at bróta niður forðingar, soleiðis at eitt nú fólk, ið eru blind, sjónveik, deyv, rørslutarnaði og onnur sleppa at luttaka á jøvnum føti.

Ráðið fyri brekað heitir tí á fyriskiparar og onnur um at taka hædd fyri, at møguleiki er hjá øllum at luttaka.

**Ráðið fyri brekað**

# -víkar ella -víks?

ARNE THORSTEINSSON

Í seinastuni hevur ein undarligur tvídráttur tikið seg upp í bløðunum. Stríðið stendur serstakliga um bendingina av kvenkynsorðinum vík í samansetingum.

Annar parturin førir fram, at vík eitur víkar í hvørsfalli eintal, og soleiðis eigur orðið altíð at verða bent. Tí er skeivt at siga ella skriva t.d. Hoyvíkshólmur ella Tjaldavíkshólmur. Hesi staðarnøvn eita av røttum Hoyvíkarhólmur og Tjaldavíkarhólmur, og soleiðis eiga tey at verða skrivað og framborin.

Nei, sigur hin parturin. Í ávísum førum fær kvenkynsorðið vík endingina –s í hvørsfalli eintal, og tí er rætt at siga og skriva t.d. Hoyvíkshólmur.

Báðir partar fara skeivir.

Sjálvandi hevur vík bert endingina –ar í hvørsfalli eintal. Vit fara til Víkar, Tjørnuvíkar, Húsavíkar o.s.fr., men hóast tað kunnu vit av røttum bæði siga og skriva Hoyvíkshólmur og Tjaldavíkshólmur, sum fólk flest eisini gera.

Innan navnagransking er tað eitt vælkent fyribrigdi, at er fyrri liður í einum samansettum navni í sjálvum sær eitt samansett navn, gerst orðið ov tungt at frambera, og fyrri liðurin missir tí bendingarendingina. Um neyðugt er, setir brúkarin í staðin inn, tað navnagranskarar kalla eina kompositiónsfugu, sum vanligvís er eitt -s-

Vit siga Víkarbyrgi, tí fyrri liðurin í sjálvum sær er eitt einstakt orð, men vit siga Tjaldavíkshólmur, tí fyrri liðurin – Tjaldavík – í sjálvum sær er settur saman av tveimum orðum. Bendingarendingin –ar verður tí burtur í Tjaldavík, og fyri at binda hetta langa navnið saman seta vit inn kompositiónsfuguna –s- millum orðini Tjaldavík og hólmur – Tjaldavíkshólmur. Hetta hava føroyingar gjørt í mangar øldir. T.d. verður í brævunum um arvastríð um ein garð í Húsavík frá fyrst í 1400árunum skrivað Húsavíksgóðs.